# Linligt í Gundadali

*1. deild: HB vann seg upp aftur á fremsta plássið í deildini, men spælið á vøllinum gav ongar ábendingar um, at talan var um ein komandi føroyameistara*



*Leikferðin var lág, og yvirhøvur skuldi ein ikki hildið, at ein møguligur komandi føroyameistari var á vøllinum sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

JÁKUP MØRK

HB-FS Vágar 4-1 (4-0)

Eftir at HB heldur óvæntað mátti lúta fyri runavíkingum fyri viku síðani, skuldi liðið royna at reisa seg sunnudagin. Uppgávan sá á pappírinum ikki so torfør út, tí alt kappingarárið hava liðini verið í hvør sínum enda av stigatalvuni.

Umframt at vera veikara liðið á stigatalvuni, máttu vágamenn eisini vera tveir av týdningarmestu leikarum sínum fyri uttan. Ari Thomassen var leikbannaður eftir reyða kortið móti B36, og í sama dysti noyddist Tór-Ingar Akselsen av vøllinum við skaða.

Eisini HB hevði sítt at dragast við, og millum annað mátti miðvøllurin fullkomuliga umskipast. Vanligi stýrimaðurin, Rúni Nolsøe, var leikbannaður, meðan Gigi, sum varð skaddur móti NSÍ, neyvan fær spælt aftur í hesum kappingarárinum. Hartil fekk Florin Miháescu reytt kort móti NSÍ, soleiðis at broytingar eisini skuldu til í verjupartinum.

## Sást aftur

At liðini bæði vóru skerd, sást eisini rættuliga væl aftur í spælinum. HB miðvøllurin fekk ongantíð glið á valiga skjóta spælið, nú Rúni ikki kundi virka sum sambindingarlið, og hjá vágamonnum var tað serliga saknurin av Ari, sum tóktist stórur.

Tað eydnaðist tó HB rættuliga skjótt at leggja seg á odda við tveimum málum, sum teir báðir ungu framherjarnir, Jón Rói og Andrew, syrgdu fyri.

Eftir hetta var tað eins og liðini bæði vistu, hvønn veg dysturin bar. HB tóktist nøgt við tvey mála leiðsluna, og royndirnar at økja um hesa vóru sera fáar.

Vágamenn megnaðu so als ikki at skapa nakað, tó at teir høvdu einar tvær royndir, sum við eitt sindur meira hepni kundu givið mál. Hesar íkomu tó í stóran mun av sløsaríi í markeringini, men tá leikferðin alla tíðina varð sera lág, hevði hetta so at siga ongar avleiðingar.

Móti endanum av fyrra hálvleiki eydnaðist tó HB at fáa tvey mál afturat. Tað fyrra av hesum var ein sonn perla, tá Jón Rói úr 18 metrum høgdi bóltin upp í handara málhorn, meðan Allan Mørkøre lítla løtu seinni kundi økja upp í 4-0, tó at hann fekk rættuliga stóra hjálp frá einum vágabeini, sum beindi bóltin upp um málverjan.

## Sovibóltur

Tá sæð verður burtur frá vakra málinum, sum Rimvydas Bakus skeyt tíðliga í seinna hálvleiki, vóru hesi trý korterini reinur sovifótbóltur. Leikferðin var í botni, markeringarnar vóru leysar, men kortini tókturst liðini bæði at hava sera torført við at fáa spælið at hanga saman. Sendingar omanfyri 10 metrar raktu sjáldan rætta móttakaran, og yvirhøvur skuldi ein ikki hildið, at talan var um tvey lið úr bestu føroysku deildini.

At annað av hesum telist millum biðlarnir til gullmerkini í hesum kappingarárinum tóktist heldur ikki sannlíkt. Spælið sunnudagin var í øllum førum ikki nakað meistaraspæl, men hinvegin er einki at ivast í, at hugburðurin hjá leikarunum verður nakað øðrvísi, tá teir komandi vikuskifti skulu til Vágs.

Ivaleyst fer tað eisini at muna væl hjá teimum, at Rúni Nolsøe tá aftur er tøkur. Dysturin móti FS Vágum sýndu í øllum førum týðuliga, hvussu stóran týdning hann hevur fyri HB liðið.

Er týdningurin av Rúna stórur, so hevur Allan Mørkøre enn ikki prógvað, at hann er tann styrkurin fyri liðið, sum áskoðararnir høvdu væntað og vónað. Møguliga er tað knæskaðin og harav væntandi venjing, sum fer um seg, men um so er, munnu bestu ráðini vera at frítaka leikarin, til hann aftur er 100% til reiðar.

Seinastu dystirnar hevur spæl hansara langt ífrá verið í tí støði, sum hann áður hevur verið á, men allar helst er tað bert ein spurningur um tíð, áðrenn gomlu dygdir hansara aftur koma til sjóndar. So er bert hjá HB viðhaldsfólkunum at vóna, at hetta verður í nóg góðari tíð til at tryggja meistaraheitið.

## Verður trupult

Vágamenn hava alt árið havt tað sera trupult, og einki bendir á, at uppgáva teirra verður lættari tey fimm umførini, sum enn eru eftir at spæla.

Vanligi liðskiparin, Ari Thomassen, verður tøkur aftur til bopnuppgerðina móti Sumba komandi vikuskifti, og einki er at taka seg aftur í, at saknurin í honum var stórur. Eitt lið er tó samansett av 11 leikarum, og fyri FS Vágar er tað av alstórum týdningi, at leikararnir ásanna hesa sannroynd.

Skulu teir bjarga lívinum í bestu deildini, skal hugburður teirra broytast heilt nógv. Stríðsviljin eigur at vera fremsta vápni í stríði teirra, men seinastu tvey umførini hevur hesin als ikki verið til staðar.

Verður ikki øðrvísi statt í so máta komandi vikurnar, fær FS Vágar sera trupult við at tryggja sær rætt til framhaldandi luttøku í 1. deild.



*Higartil hevur Allan Mørkøre ikki verið tann styrkur, sum HB viðhaldsfólkini høvdu roknað við og vóna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HB-FS Vágar 4-1 (4-0)**
1-0: Jón Rói Jacoobsen
2-0: Andrew av Fløtum
3-0: Jón Rói Jacobsen
4-0: Allan Mørkøre
4-1: Rimvydas Bakus

Dómari: Petur Hansen

**HB:**
Bárður Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Allan Mørkøre, Ingi Rasmussen, Hallur Danielsen, Rói Árting – Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum

**FS Vágar:**
Remigius Mikocionis – Poul Kjartan Thomsen, Zilvanius Zudis, Eyðfinn Fjalsbak, Rimvydas Bakus – Sonni Johansen, Hannus Olsen, Igoris Kirillovas, Kim Poulsen – John Johansen, Birgir Joensen



# NSÍ setti oddaliðið so rudduliga upp á pláss

*B hevði einki at siga í Runavík, har væl upplagda heimaliðið var betri í øllum lutum*



NSÍ-VB 4-0 (0-0)

VB gav í Runavík ongar ábendingar um, at teir vóru oddalið, og at teir ætlaðu sær at vinna og harvið at styrkja um møguleikan at vinna fyrsta meistaraskapin nakrantíð.

Leygardagin nevndu vit vandan fyri, at teir í NSÌ fóru at kennast mettir, tí teir ikki høvdu tapt fimm ferðir á rað. Einki sást til mettuna. NSÍ menninir vóru í staðin heilt svangar. Allir runnu fyri ein, og ein rann fyri allar. Eftiransingarnar hjá teimum vóru góðar, teir vóru sterkari í luftini, og teir takladu sannførandi. At teir alla tíðina megnaðu at leggja trýst á mótstøðumenninar gjørdi, at VB ongantíð fekk høvi at vísa álopsligar dygdir.

Álopsspælinum hjá NSÍ bilti einki. Ofta hevur tað kenst sum 4–4–2 spælskipanin hjá teimum hevur verið stív og ov løtt at lesa av. Tað var hon avgjørt ikki hesa ferð. Ian Højgaard var sera kreativur á framrættaða miðvallarplássinum, og aftanfyri hann megnaði Abraham Løkin at halda upp á bóltin, tá tað var neyðugt at bíða eitt vet. Í høgra borði var Gert Langgaard so góður við bóltinum, sum hann altíð hevur verið, og hann gjørdist uppaftur meiri vandamikil, tá miðvallararnir høvdu eyga at spæla hann júst í røttu løtuni. Í vinstra borði ffekst nytta burturúr skjótleikanum hjá Jónsteini Petersen, sum útstrálaði nógv størri sjálvsálit, enn hann gjørdi undan summarsteðginum.

Í 1. hálvleiki kom einki mál, men NSÍ hevði bóltin nógv, og tað var júst Jónstein Petersen, sum hevði bestu royndina úr fimtan metrum í vinstru, men bólturin smeyg sær dygst uttanfyri handara stólpan hjá Bjarna Johansen, sum var besti vágbingurin í Runavík.

## Álitisfullir

Hóast einki mál kom í 1. hálvleiki, so var talan um gott undirhald. Intensiteturin var stórur, nærdystirnir nógvir, og hóast tað nógva gekk fyri seg á VB hálvuni, so lúrdi møguleikin fyri, at okkurt snarálop hjá VB skuldi bera møguleika við sær.

Tað eydnaðist ongantíð VB at fáa mál. Seint í 1. hálvleiki bar skjótt uppspæl í vinstru, har Robert og Jón Pauli Olsen vóru akritektar, størsta møguleikan við sær. Men Palli Augustinussen var akkurát ov seinur at stýra flata innlegginum inn um Rúna Joensen.

Verjuparturin hjá NSÍ kendist tryggur. At Djóni N. Joensen er fluttur av miðvøllinum og longri aftur á vøllin er funnin fressur. Arnfinn Langgaard er sterkur við høvdinum og góður íblásari hjá hinum, Kári Hansen hevur verið tryggur í høgra borði, og Sjúrður Jacobsen er í vinstra borði tryggur í bæði verjupartinum og álopspartinum samstundis sum hann altíð er ein skothóttan.

At liðavrikið bar fýra mál og harvið stórsigurin við sær, høvdu álopsmenninir sín stóra lut í. Dánial Hansen hevur góða bóltfatan, og tá hann við handara stólpan vann nærdyst við Bjarna Johansen og stútaði diagonalbólt frá Abrhami Løkin í málið hevði avgerandi týdning fyri dystargongdina í øllum regninum.

## Tannleyst oddalið

Bara ein lítil løta var farin,, og hjá VB kom hetta ómetaliga illa við. Í staðin fyri at hava nógv fólk aftarlaga á vøllinum og sinnliga lúra eftir kontra møguleikanum, noyddust teir at flyta fólkið longri fram. At tapa við einum ella tveimum málum kundi gera tað sama. VB fekk snøgt sagt einki burturúr, og spælararnir vórðu alt meiri strongdir. Robert royndi onkuntíð, tá Bjarni Johansen sendi langar bóltar fram, men einki fekst burturúr.

Popczynski og Milan Kulic vóru púra litleysir, og tá Jón Pauli Olsen og Tórður Holm eisini vóru anonymir, sigur tað seg sjálvt, at tað bara kundi ganga skeiva vegin hjá oddaliðnum.

NSÍ skoraði trý mál afturat. Tað var eitt, men nakað annað var tað, at málini vórðu skorað soleiðis, at tað kendist eyðmýkjandi fyri oddaliðið. Og tað vil aftur siga, at sjálvsálitið hjá teimum fekk eitt orduligt skot fyri bógvin.

VB verjan steðgaði upp og vildi hava rangstøðu, bæði tá Sjúrður Jacobsen var púra blankur í málteiginum eftir diagonalbólt úr vinstru og skoraði til 2–0, og tá uppspæl í vinstru endaði við innleggi til Christian Høgna Jacobsen, sum var púra blankur. Tá vóru ávikavíst 56 og 81 minuttir farnir. Fýra minuttir restaðu, tá NSÍ eyðmýkingin av oddaliðnum tóktist fullkomin. Tórður Holm royndi í vinstru at sneiða framvið Gert Langgaard, men NSÍ miðvallarin fekk bóltin av VB manninum, tá hann kom móti baklinjuni trillaði hann bóltin innfyri, og so kundi innskifti Sonni L. Petersen staðfesta rimmar NSÍ sigurin, sum var tann fjórði á rað.

VB skal inntil komandi sunnudag slikka djúpu sárini. Um tað fer at hjálpa fæst at síggja, tá teir sunnudagin fáa vitjan av HB!

JH

**NSÍ-VB 4-0 (0-0)**
1-0: Dánial Hansen 48
2-0: Sjúrður Jacobsen 55
3-0: Christian Høgni Jacobsen 82
4-0: Sonni L. Petersen 83

**NSÍ:**
Rúni Joensen – Kári Hansen, Arnfinn Langgaard, Djóni N. Joensen, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Abraham Løkin, Ian Højgaard, Jónstein Petersen – Christian Høgni Jacobsen, Dánial Hansen

**VB:**
Bjarni Johansen – Palli Augustinussen, Jón Gærdbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen, Jón Pauli Olsen – Tórður Holm, Milan Kulic – Krzysztof Popczynski, Robert Cieslewicz

